MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 4. august 2017
Tygara ref.:
Máltal: 16/00838-42

# Avtala millum Fjølrit og Mentamálaráðið um nýtslu av vardum verkum í undirvísingarvirkseminum innan miðnám, hægri útbúgvingar og Próvstovuna (hereftir nevnd "Avtalan")

**Avtalan er galdandi**

**millum**

**Fjølrit og Mentamálaráðið**

**FJØLRIT** er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella aðra margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í Fjølrit: Rithøvundafelagið, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

Fjølrit hevur, sum er, B-avtalu við Copydan Tekst & Node, Kopinor, Fjölis og Bonus Presskopia, ið heimilar Fjølrit at gera avtalur við brúkarar í Føroyum um brúk av donskum, norskum, íslendskum og svenskum verkum.

**MENTAMÁLARÁÐIÐ** ger avtalu vegna miðnámsskúlar, hægri útbúgvingarstovnar og Próvstovuna.

## § 1: Allýsingar

Sum "miðnámsskúlar" er at skilja miðnámsskúlar, sum eru nevndir í fíggjarlógini undir økinum miðnámsskúlar.

Sum "hægri útbúgvingarstovnur" er at skilja teir stovnar, sum eru nevndir í fíggjarlógini undir økinum hægri útbúgvingar og gransking.

Sum "Próvstovan" er at skilja virksemi Mentamálaráðsins, sum framleiðir próvtøkutilfar til allar skúlar, og framleiðsluvirksemið hjá teimum einstøku skúlunum í sambandi við royndir og próvtøkur.

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

At framleiða eintøk til brúk innan undirvísingarvirksemi sambært Avtaluni merkir framleiðsla av eintøkum, sum einstakir skúlar og stovnar gera, ella sum teir lata onnur gera til brúk innan undirvísingarvirksemi, óansæð um framleiðslan av eintøkum fer fram í einstaka skúlanum, stovninum ella aðrastaðni.

Hugtakið undirvísingarvirksemi fevnir eisini um próvtøkur og aðrar royndir, ið Mentamálaráðið varðar av sambært galdandi lógum.

At framleiða eintøk til innanhýsis nýtslu sambært Avtaluni merkir framleiðsla av eintøkum til brúk hjá leiðslu, starvsfólki, stýrum, ráðum, nevndum o.l.

Ein útgáva sambært Avtaluni merkir ein prentað útgáva í likamligum líki, har verkið á lógligan hátt er atkomandi hjá almenninginum t.d. í einari bók, faldara, tíðarriti, blaði, avís.

Ein mynd sambært Avtaluni merkir listaverk, myndlist, fotolist, fotomynd, framleiðsla av fotomyndum, grafikkur v.fl., uttan mun til um myndin er partur av teksti ella ikki.

**§ 2: Nýtsluøkið avtalunnar**

Avtalan gevur einstøku skúlunum og stovnunum samsvarandi ásetingunum í Avtaluni og innan karmarnar av góðkendu viðtøkunum fyri Fjølrit rætt til at endurgeva, ljósrita, avrita, fjølrita ella á annan hátt at margfalda eintøk av útgivnum verkum til brúk innan undirvísingarvirksemi, herímillum granskingarvirksemi.

Stk. 2. Harumframt gevur Avtalan Mentamálaráðnum, skúlum og stovnum tess rætt at framleiða eintøk av vardum verkum til innanhýsis nýtslu, sbr. §§ 14 og 42 í upphavsrættarlógini.

**§ 3: Nýtsla innan undirvísingarvirksemi**

Avtalan fevnir um framleiðslu av eintøkum av øllum útgivnum verkum, tað veri seg føroysk ella útlendsk verk. Avtalan hevur sostatt virknað við avtaluloyvi sambært § 13 í upphavsrættarlógini.

**§ 4: Innanhýsis nýtsla**

Avtalan fevnir um framleiðslu av eintøkum av yrkisligum greinum í bløðum, tíðarritum og rit-søvnum og av styttri brotum av útgivnum yrkisligum verkum, tónleikaverkum og myndlýsingum, sum eru endurgivin í tilknýti til tekstin í eitt av teim nevndu verkunum í tann mun, at innihaldið er viðkomandi fyri virksemið hjá viðkomandi skúla ella stovni, sbr. § 14 í upphavsrættarlógini.

**§ 5: Hættir at framleiða eintøk**

Avtalan loyvir framleiðslu av eintøkum, heruppií ljósprent av prentaðum bókaútgávum, prent, ljósprent av prenti og telefakssendingum. Avtalan loyvir eisini at framleiða eintøk til brúk í uppvørpu og líknandi framløguhátti, heruppií talgildum framløguhættum eitt nú Power Point. Framleiðast mugu ikki fleiri enn tríggjar síður pr. verk til brúk í sambandi við framløgur, sum nevndar eru í 2. pkt., sbr. §§ 7 og 8 í Avtaluni.

Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## § 6: Avmarkingar í rættinum at framleiða eintøk sambært hesi avtalu

Avtalan gevur rætt til at framleiða eintøk av útgávum pr. ársverk (rakstrarstarvsfólk undantikin) við hesum avmarkingum:

1) Skúli ella stovnur má ikki framleiða meir enn 20% av eini útgávu, ið er eldri enn 5 ár frá gildiskomuni av Avtaluni; tó í mesta lagi 75 síður
2) Skúli ella stovnur má ikki framleiða meir enn 15% av eini útgávu, ið er yngri enn 5 ár, men eldri enn 1 ár frá gildiskomuni av Avtaluni; tó í mesta lagi 40 síður.
3) Skúli ella stovnur má ikki framleiða meir enn 10% av eini útgávu, ið er yngri enn 1 ár frá gildiskomuni av Avtaluni; tó í mesta lagi 25 síður.
4) Um útgáva verður framleidd umvegis ljóslesing og talgildari goymslu, má skúli ella stovnur í tílíkum føri ikki framleiða meiri enn 20% av útgávuni; tó í hægsta lagi 20 síður av somu útgávu pr. næming í sama skúlaári. Tað er ikki loyvt at broyta í verkinum, tá ið verkið verður ljóslisið og goymt talgilt.
5) Í sambandi við nýtslu sambært pkt. 4 omanfyri, t.e. ljóslesing og talgild goymsla, er tó heimilað starvsfólki og næmingum í einstaka skúlanum ella stovninum at prenta tað ljóslisna ella talgilda við somu avmarking, sum nevnd er í pkt. 4, á sjálvvaldum staði til brúk í undirvísingini.
6) Einstaki skúlin skal tryggja, at starvsfólk og næmingar einans fáa atgongd til ljóslisið og talgilt goymt tilfar umvegis nýtslu av loyniorði.

Stk. 2. Fyri tíðarrit verður %-avmarkingin í nr. 1-4 omanfyri roknað av samlaða síðutalinum av einum árgangi av tíðarritinum.

Stk. 3. Framleiðsla av eintøkum er bert til brúk hjá einum skúlaárgangi – ikki til goymslu.

Stk. 4. Eintøk av útgávum, ið eru 4 síður ella minni, kunnu framleiðast 100%.

Stk. 5. Treytin fyri nýtslu av allari framleiðslu er, at útgávan á lógligan hátt er vorðin atkomulig hjá almenninginum, sbr. § 11, stk. 3 í upphavsrættarlógini.

## § 7: Avmarkingarskipan

Avtalan gevur ikki einstaka skúlanum ella stovninum rætt til at framleiða eintøk av vardum verkum, har tað er gjørligt í hvørjum einstøkum føri at avgreiða spurningar um rættindi umvegis hald, har gjald verður kravt. Hetta tí at stovnar ella skúlar skulu virða tær avmarkingar, ið fylgja við tílíkum haldum/avtalum.

Stk. 2. Í tann mun at ávís framleiðsla av eintøkum fellur uttan fyri karmarnar av Avtaluni, má einstaki skúlin ella stovnurin fáa neyðugt samtykki til vega frá rættindahavaranum, sbr. tó § 9.

## § 8: Frí nýtsla

Framleiðsla av eintøkum, ið fellur undir reglurnar í upphavsrættarlógini um fría nýtslu, er ikki fevnt av Avtaluni, og slík nýtsla krevur heldur ikki samtykki frá rættindahavara.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**§ 9: Uppgerð og viðurlag**

Fjølrit sendir á hvørjum ári áheitan til Mentamálaráðið, undirvísingarstovnar, aðrar stovnar, stýri, ráð, nevndir o.l., sum eru umfatað av Avtaluni, um at geva upp

- talið á næmingum á øllum umfataðum undirvísingarstovnum,
- talið á persónum í Mentamálaráðnum, lærarum og øðrum starvsfólki í umfataðum undirvísingarstovnum og talið á persónum í stýrum, ráðum, nevndum o.l., sum eru umfatað av Avtaluni, og
- ítøkiliga brúkið sambært Avtaluni.

Mentamálaráðið skal eftir áheitan frá Fjølrit lata upplýsingar um, hvørjir undirvísingarstovnar, aðrir stovnar, stýri, ráð nevndir o.l. eru umfatað av avtaluni.

Stk. 2. Viðurlagið, sum skal gjaldast Fjølrit fyri nýtslu av vardum verkum eftir hesari avtalu, verður ásett í serskildari avtalu.

**§ 10: Aðrar treytir**

Einstøku skúlarnir og stovnarnir hava ábyrgdina av, at øll framleiðsla av eintøkum av upphavsrættarliga vardum verkum, sum hesir gera ella lata onnur gera, virða Avtaluna. Einstøku skúlarnir og stovnarnir skulu kunna leiðslu og starvsfólk um innihaldið í Avtaluni.

Stk. 2. Fjølrit hevur skyldu til at fríhalda brúkararnar fyri øllum krøvum, sum føroyskir ella útlendskir rættindahavarar seta fram, grundað á framleiðslu av eintøkum sambært Avtaluni.
Stk. 3. Ósemjur millum Fjølrit øðrumegin og Mentamálaráðið, undirvísingarstovnar, aðrar stovnar, stýri, ráð, nevndir o.l., sum eru umfatað av Avtaluni, hinumegin, verður í fyrsta lagi løgd fyri ein óheftan semingsmann sambært kunngerð um seming innan upphavsrættarøkið.

**§ 11: Gildiskoma, uppsøgn o.a.**
Avtalan er í gildi frá tí, at umboð fyri partarnar við tekningarrætti hava skrivað undir Avtaluna.

Avtalan kann sigast upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi 1. august 2020.

Gildið av hesi Avtalu er í síni heild treytað av, at Fjølrit í øllum avtalutíðarskeiðnum er góðkendur sum felagsskapur í Føroyum.

**Staður og dagur:** Tórshavn, 4. august 2017

| | |
|---|---|
| **FJØLRIT** | **MENTAMÁLARÁÐIÐ** |
| Atli K. Petersen, *formaður* | Rigmor Dam, *landsstýriskvinna* |
| | Martin Næs, *deildarstjóri* |